Poul Hansen gevst í Suðuroy

Poul Hansen læt heilsølu upp í Suðuroy í 1964 og hevur verið ein býarmynd á Tvøroyri síðani. Men nú hvørvur hendan býarmyndin tí á nýggjarinum letur heilsølan aftur

Á nýggjárinum letur heilsølan hjá Poul Hansen aftur á Tvøroyri. Tey 10 fólkini, sum arbeiða har, eru søgd upp

AVTOFTING
Áki Bertholdsen

Mikudagin fingu tey 10 fólkini, sum arbeiða hjá Poul Hansen á Tvøroyri, eini ring boð frá leiðsluni í Havn: Boðini vóru, at á nýggjárinum gevst Poul Hansen við heilsølu í Suðuroy. Tey 10 fólkini, sum arbeiða hjá Poul Hansen í Suðuroy, eru samstundis søgd upp.

Tey hava fingið at vita, at tað er tann harða kappingin, sum ger, at Poul Hansen nú gevst á Tvøroyri. Fleiri handlar eru lætnir aftur í Suðuroy seinastu árini og samstundis eru tað fleiri og fleiri handlar, sum keypa varu sjálvir.

Ístaðin fyri at hava heilsølu í Suðuroy, fer Poul Hansen ístaðin at koyra til Suðuroyar tvær ferðir um vikuna við heilsølubili.

Men tað er onki at ivast í, at hetta verður eitt stórt afturstig fyri handilslívið í Suðuroy, ikki minst teir smærru handlarnar, tí tey, sum arbeiða hjá Poul Hansen siga at, at har ganga fólk allan dagin eftir varu, sum tey mangla beint nú og at tey hava meiri enn nokk at gera.

– Hóast, vit hava nok kat gera, er tað kortini ikki nokk, sigur arbeiðsformaðurin, Arni Petersen, speiskliga

Sjálvur hevur hann arbeitt hjá Poul Hansen í 35 ár og flestu av starvsfólkunum hava arbeitt leingi, so hann dylir ikki fyri, at tað verður undarligt at fara at gera okkurt annað.

bin Laden krevur prógv

Samstundis ljóðar, at yvirgangsmaðurin als ikki er í Afghanistan longur.

Avgerðin hjá teimum skriftlærdu og prestunum í Afghanistan at mæla Osama bin Laden til at fara av landinum sjálvboðin hevur eftir øllum at dømu ikki tann stóra týdningin. Tá saman um kemur, er tað einans landsins andaligi leiðari, Mullah Mohammad Omar, sum hevur avgerðarættin í hesum sum í øðrum málum.

Sambært einum talsmanni hjá afghanska Taliban-stýrinum skal bin Laden hava sagt seg vera til reiðar at fara fyri rættin í sambandi við atsóknirnar í New York og Washington. Tann kendi yvirgangsmaðurin heldur fast um, at hann er ósekur í hesum føri, og í gjár endurgav stjórnartalsmaðurin bin Laden fyri at hava sagt:

– Eg havi einki við hetta mál at gera. Eg eri í Afghanistan sum gestur. Hevur USA eitt prógv, eri eg, Osama bin Laden, til reiðar.

Amerikanarar vóru skjótir at svara. Teirra krav er tað sama: bin Laden skal útflýggjast.

Í Indonesia

Ein heilt annar spurningur er nú, um bin Laden yvirhøvur er í Afghanistan. Óváttað, men kortini rættiliga álítandi tíðindi vilja vera við, at hann er í Indonesia, og at hann fjalir seg millum tey nógvu túsundtals flóttafólkini, sum eru komin hagar úr Afghanistan.

Tað hevur eisini ljóðað, at bin Laden hevði nakrar viðhaldsmenn við sær, og at teir skulu hava ætlanir um eina atsókn at amerikansku sendistovuni í Jakarta, indonesiska høvuðsstaðnum.

Indonesia er størsta muslimska landið í heiminum, og indonesar jálvir siga tað ikki vera óhugsandi, at bin Laden hevur stuðlar í landinum.

Indonesiski forsetin, Megawathi Sukarnopoutri, hitti hósdagin George W. Bush, forseta í Washington. Í Indonesia royndi løgreglan um somu tíð at fáa greiði á, um yvirgangsmaðurin nú var komin hagar.

Fyrimunir og vansar við ymsum pensjónsskipanum

PENSJÓNSMÁL
Áki Bertholdsen

Hetta sigur Bent Rold Andersen eru fyrimunir og vansar við ymsum pensjónsskipanunum, eitt nú fólkapensjónini og arbeiðsmarknaðarpensjónini, har hvør sparir saman til sína egnu pensjóm.

Arbeiðsmarknaðarpensjónirnar eru eitt brot á tað samhaldsfesti ímillum ættarliðini, sum fólkapensjónin er eitt tekin um. Tey, sum nú eru pensjonistar koma aldrin at fáa lut í arbeiðsmarknaðarpensjónunum, tí at sparingsskeiðið er alt ov langt.

Arbeiðsmarknaðarpensjónirnar eru ein boðskapur frá mið- og unga ættarliðnum til teirra foreldur um, at »fólkapensjónin er nóg góð til tykkara, men táið vit verða gomul, ætla vit ikki at liva á tí stigi, sum fólkapensjónin er«.

Fólkapensjónin minkar um sosiala ójavnan, sum marknaðarkreftirnar skapa millum tey vinnuføru.

Tá ið arbeiðslívið er lagt afturum, er ikki longur neyðugt, at marknaðarkreftirnar framvegis skulu ráða. Tá eigur at vera rúm fyri javnaði gjøgnum eina fólkapensjón, sum er á einum sømiligum støði. Heldur onkur, at tað er ikki nóg mikið, ja so stendur einum frítt at spara. Men tað er eingin meining í, at hinir skattaborgarnir skulu gjalda fyri tað gjøgnum skattligan stuðul ella frádráttir.

Mótvegis fólkapensjónini varðveita arbeiðsmarknaðarpensjónirnar teir sosialu ójavnarnar inn í aldurdómin. Tey, sum hava havt góðar inntøkur gjøgnum lívið, fáa eisini meira, tá tey verða gomul. Og tað fer fram við almennum stuðuli sum skattafyrimunir.

Skyldbundnu gjøldini til arbeiðsmarknaðarpensjónirnar eru búskaparliga tað sama sum skattur á lønina. Tí verða eisini øll skyldbundin sosial gjøld roknað upp í skattatrýstið í øllum altjóða búskaparligum samanberingum. Frádráttirnir fyri tey tvungnu gjøldini føra við sær eina minking í teim skattskyldugu inntøkunum. Sostatt verður skorið av teirri skattainntøkuni, sum skal brúkast til tær almennu útreiðslurnar, m.a. til fólkapensjón, eldraumsorgan, heilsuverk, skúla og útbúgving, samferðslu o.s.fr. Hetta er ein høvuðsorsøk til fíggingartrupulleikarnar hjá tí almenni sektorinum í Danmark og líknandi londum.

Tey sum verja skyldbundnar pensjónssamansparingar sum arbeiðsmarknaðarpensjónirnar, rættvísgera seg við, at ein stór og støðug privat samansparing hevur gagnliga búskaparliga ávirkan og serliga fremur størri búskaparligan vøkstur. So einfalt er tað avgjørt ikki. Ein stór privat samansparing kann verða gagnlig, tá ið búskapurin er í stórum vøkstri, tí samansparingin kann tálma inflatiónini og fremja íløgurnar. Men tá ið stígur kemur í búskapin, kann ein stór privat samansparing ikki fremja íløgurnar. Tvørturímóti kann hon verða við til økja tað skeivu gongdina í búskapinum við at minka um eftirspurningin og harvið um vinnuliga virksemið.

Stutt um Bent Rold Andersen

Hvussu skulu vit útbyggja pensjónsskipanina? Hetta er ein av teim brennandi spurningunum, sum stendur fremst í orðaskiftinum í Føroyum ídag. Leiðirnar tykjast í høvuðsheitum at verða tvær: ein, sum byggir á fólkapensjónina og samhaldsfasta, og ein sum byggir á skyldbundnar pensjónssamanparingar.

Ongin ivi er tí um, at hetta tjakið fer at koma fram um flest onnur mál, tí tað fevnir um viðurskifti av ovurstórum samfelagsligum týdningi, og uttan mun til hvør avgerðin verður, fer tað at hava avleiðingar nógv ár fram í tíðina fyri hvønn einasta føroying.

Um Bent Rold Andersen kann upplýsast, at hann

Bent Rold Andersen er ein hin fremsti serfrøðingurin yvirhøvur í pensjónsviðurskiftum. Hann sigur, at frægasta loysnin er at hækka fólkapensónina. At gera arbeiðsmarknaðar pensjónsgrunnar er ein ein vánalig loysn, bæði sosialpoltiiskt og samfelagsbúskaparliga

- er úttbúgvin búskaparfrøðingur frá Keypmannahavnar Universiteti í 1956.
- hevur starvast við samfelagsvísindaliga granskning á Keypmannahavnar og Roskilde Universitetum, á Sosialgranskingarstovninum í Keypmannahavn, og á granskingarstovninum hjá donsku amtunum og kommunum.
- hevur skrivað vísindaligar og populervísindaligar bøkur um búskaparlig og sosialpolitisk evni Tann síðsta er »Ældrepolitik på Afveje« 1999.

Onnur størv, hann røkir og hevur røkt:

- Professari í arbeiðsmarknaðarpolitikki og í sosialpolitikki.
- Limur í formansskapinum fyri danska Búskaparráðnum 1973-78.
- Formaður fyri Búskaparráðnum – á mannamunni nevndur »yvirvísmaður« – 1976-78
- Formaður fyri Eldrakommissiónini 1979-82
- Ráharri í almannamálum í 1982
- Formaður fyri Eldraíbúðarráðnum í Danmark 1994-2000
- Formaður fyri Eldraráðnum í Næstved kommunu 1997 -

Serfrøðingur ivast ikki: Besta loysnin er ein góð fólkapensjón

– Í Føroyum eru vit komin so stutt áleiðis at viðgera pensjónsmálið, at enn ber til at sleppa undan at gera somu mistøk sum onnur hava gjørt, sigur Bent Rold Andersen, serfrøðingur í eftirlønarmálum

EFTIRLØNARMÁL
Áki Bertholdsen

Hvussu skulu pensjónsviðurskiftini í Føroyum verða í framtíðini? Skulu vit hava arbeiðsmarknaðarpensjón, ella skal fólkapensjónin hækkast?

Hetta hevur verið ein brennandi spurningur í Føroyum seinastu árini.

Í komandi viku ber til at fáa at vita, hvat ein hin allarfremsti serfrøðingurin á økinum yvirhøvur heldur um hendan spurningin.

Tá kemur danski búskaparfrøðingurin, Bent Rold Andersen, til Føroya at halda fyrilestrar um pensjónsmál.

Tað er Føroya Arbeiðarafelag, sum hevur tikið stig til at fáa danska serfrøðingin hendavegin í døgunum 26. til 29. september.

Hósmorgunin fer Bent Rold Andersen at halda tíðindafund og hóskvøldið fer hann at halda almennan fyrilestur um pensjónsmál á Hotel Føroyum hóskvøldið 27. september.

Í hesum sambandi hevur Føroya Arbeiðarafelag boðað fakfeløgum, politisku flokkunum, arbeiðsgevarum og øðrum frá, men øllll áhugað eru vælkomin.

Frígjadagin fer hann at halda fyrilestur fyri nevndarlimunum í lokalfeløgunum hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Á hesum fyrilestrunum fer hann at tala um, hvørjir møguleikar eru at bøta um okkara pensjónsviðurskifti, um tað skal vera við arbeiðsmarknaðarpensjónum, har hvør sparir til sína egnu pensón, ella um tað tað er betri at hækka fólkapensjónina

Sjálvur ivast hann ikki í, at bæði sosialpolitiskt og samfelagsbúskaparliga er tað frægasta loysnin at hækka fólkapensjónirnar.

Kunnu sleppa undan mistøkum í Føroyum

Mitt í áttatiárunum høvdu tey sama orðaskifti um pensjónirnar í Danmark, sum vit nú hava í Føroyum

Eins og her, stóð spurningurin í Danmark um, antin tey skuldu útbyggja fólkapensjónina ella fara ein annan veg og skipa arbeiðsmarknaðarligar pensjónssamansparingar. Hesar arbeiðsmarknaðarpensjónir kundu so vera sáttmála- ella lógarbundnar.

Í Danmark gjørdist endin, at tey fóru eftir arbeiðsmarknaðarpensjónini, sum eru sáttmálabundnar, persónligar eftirlønarsamansparingar.

Í orðaskiftinum har var Bent Rold Andersen ein av heitastu talsmonnum fyri, at besta leiðin var at útbyggja fólkapensjónsskipanina. Hesa støðuna hevur hann vart síðani tá sum fyrilestrarhaldari og rithøvundur – seinast í bók síni, »Ældrepolitik på afveje«. Í hesi bókini setir hann fólkapensjóna upp ímóti arbeiðsmarknaðar pensjónssparingunum. Út frá gjøllligum og sannførandi sosialpolitiskum og samfelagsbúskaparligum sjónarmiðum finst hann harðliga at arbeiðsmarknaðarpensjónunum. Hann sigur, at skyldbundnar pensjónsuppsparingar slíta samhaldsfesti og økja gjónna og stættarmunin í millum ættarliðini. Tær elva eisini til, at tað fer at verða trupult fíggja almennar uppgávunum um skattin. Harumframt er tað tað er ógviliga ivingarsamt, um tær hava ta gagnligu ávirkanina á samfelagsbúskapin, sum sagt verður.

Bent Rold Andersen heldur, at eru vit komin so stutt við pensjónsuppsparingarskipanum í Føroyum, at enn ber til at sleppa undan at gera sama mistak her, sum gjørt var í Danmark.

– Hjá okkum ber enn til at velja ta sosialpolitiskt skilagóðu loysnina, sum fólkapensjónsskipanin er.

Annars heldur hann, at at Samhaldsfasti eftirlønargrunnurin í Føroyum er ein góð skipan, sum gongur væl saman við fólkapensjónini.

Afturímóti hesum báðum eru tær skyldbundnu pensjónsgrunnarnir ein vánaligur møguleiki, sigur Bent Rold Andersen.

– Sama, hvørjar pensjónsskipanir, vit velja í Føroyum, fer tað at fáa avleiðingar fyri hvønn einasta føroying. Ein hin fremsti serfrøðingurin yvirhøvur í pensjónsviðurskiftum er heitur talsmaður fyri at at hækka fólkapensjónina, heldur enn at stovna arbeiðsmarknaðargrunnar, har hvør sparir saman til sína egnu eftirlønarmál

eru nú

FAROESOFT
EITT FARODANE FELAG

Í sambandi við at vit hava skift navn og eru flutt, bjóða vit við skiftafólkum og øðrum áhugaðum til móttoku í nýggju hølum okkara í

Tórsgøtu 16,

frígjadagin 28. september

kl. 15.00-17.00

FAROESOFT

Tórsgøta 16 • Postboks 3119 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 350 350 • Fax. +298 350 360 • faroesoft@faroesoft.com

www.faroesoft.com